VIÐMERKINGAR

Kunngerð frá Landsfelag føroyskra valamanna

Fundarfrásøgn

Ár: 2002
Dagur: miðvikudagur 9. oktober

Eftir áheitan frá:
Tórshavnar Kommunu
Friðingamevndini fyri Streymoyar Syslu og
Yvirfriðingamevndini

varð í skundi boðað til fundar í umboðsmannaríðurnni í dag kl. 14.00.

Evni: Góðkenning av ætlan fyri ólkið í Sandvíkum norðan fyri Hvítanes til ítróttarøki.

Orsøkin til at málið hevur slíkan bráðskund, verður sagt í áheitanni, at tað er músð gamalt, at tað má setast í verk, áðrenn tað fyrnast og áðrenn mótmæli fara at koma móti avgerðini.

Eftir nevnvari gjógnumgongd og viðgerð av málinum kom umboðsmannafundurin til fulla semju at taka undir við ætlanum at nýta hetta framúr náttúruvakra ólkið til skotvenjingar og samtykti einmælt at kunngera hesa niðurstøðu:

Vit halda:
- at tað er bæði rætt og ímuligt at eitt tillikt loyvi verður givið við hesum treytum
- at allar greinir av skotvenjingum skulu vera umboðaðar og
- at skotkappingar verða hevdar innan allar greinir á hvørjum ári
- at skjóta rygg verður hóvuðsskotgreinin umfram
- skímaslot
- aldurslot
- síðurslot
- innskot
- undirskot
- yvirskot
- uppskot
- áskot
- fráskot
- útskot
- tilskot
- heksaslot og
- verða hesar treytir ikki upp fyltar, so verður góð kenningin tilkin aftur og hon kann ikki verða endurnýggjað og
- henda avgerð kann ikki verða skotin inn fyri hegni rætt

Við hávirðing
R. í Holu
Landsforseti

Erling S, skrivari

Hvaðani fór hann

Hvaðani fór hann, ið myndaði meg úr jørð,
ið ristí meg úr máldini har gras í dag gujr,
ið blástí lívsins anda har eyðið dungi lá,
og vekti meg til lívið ið avigt myrkur sá.

Var hann bert eindreymur ið fjálgaði eitt bil,
eitt stórri liv enn lívið handan kosmos vit og skil,
ið eygleiddi heimsins sógur sum telvanið sær sítt spæl,
har hvítur herður stáðist mót svørtum fólki væl.

Eg havi hoyrt um ein mann ið har livdi
tá ið rómverjar ráddu í borg,
ið lærdi vekli upp viðlið byggja
uttan svíða, synd ella sorg.

Er tað sett ið Nietzsche sigur um hann ið kom Mósesar veg,
at hann ið nevndist "eg eri" spyr menniskja "eri eg"
ið vígar meg á vektini so vinnið mítt hann sær,
sjálvur á vektina lagður og ov lettur funnin vær.

Er heimurin frá honum tilkin ið heimin hevur sagt
so hann hevur givið sjálvum sær alla heimsins magt,
so menki á enni og handabakið tvíðum merkir tað
at vitið og valið ei skaparans er, men "eg" ið havi tað.

Kári Øster

60'ara - 70'ara dansur í Mentanarhúsinum í Fuglafirði

DANSUR
Tíðindaskrív



Komandi vikuskifti verður stórt dansitiltak í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Tað eru tey gomlu, kendu bygdaorkestrini: Silly Boys, Absurdy Fair og tao nyggjara Atlas, ið spæla upp til góðan dans. Og spælarnir siga, at sjálvt um tað er tónleikur frá 60'unum og 70'unum, ið teir spæla, so er tað eisini góður dansimúsikkur fyri yngrur ættarlioni.

Fleiri tiltók hava nú verið í Mentanarhúsinum, síðani tað var tikið í nýtslu, og fólk lata sera vel at, bæði tey, ið framfóra tónleik og sang - og tey, ið eru áhoyrarar - ella gestir til tiltók so sum til dans.

Leioslan í húsinum leggur dent á, at skil er í Ma. er útskeinking sjálvsagt bert til fólk yvir 18 ár - og tað ber ikki til at fara út um barrina við tí, tú hevur keypt tær. Soleiðis verður forðað fyri, at nakar kann keypa fyri onnur.

Tað verður eisini ansað vel eftir, at ikki fleiri koma inn, enn loyvt er, og tí er avmarkað atgongd, so tey, sum fegin vilja í dans annað ella bæði kvøldini, mugu tryggja sær atgongumerki í góðari tíð.

Atgongumerki í forsølu fáast á Kunningarstovuni í Tórshavn, í Kiosk Vár í Runavík, á Shellstøðini í Gøtudali og hjá Haraldsen í Fuglafirði.

Matstovan í Mentanarhúsinum er opin frá kl. 19.00 - og tað ber til at bíleggja borð á tlf. 224253.

Í samband við dansin koyra bussar úr Steinatúni í Havn kl. 22.30, av Strond - um kl. 22.30 - og av Toftum kl. 22.30. Tekning á tlf. 223311.

Tað er Fuglafjarðar Hornorkestur, sum stendur fyri hesum tiltaki. Ein plakat varð gjørd og er hon hongd upp nógva staðni runt um í landinum. Á plakatuni eru ikki færri enn 18 lokal virkir, ið stuðla við ávísari peningauppheedd. Hornorkestrið nýtir hóvið her at takka øllum stuðlunum so hjartaliga.

Eitt mýguligt yvirskot av tiltakinum vil orkestrið nýta til innkeyp av ljóðfórum, har málið er, at allir spælarar innan langt um lívur, sita við nyggjum ljóðfórum, sigur Fuglafjarðar hornorkestur í tíðindaskrivi.

Stór heystmótasýning á Hotel Føroyum

Handlar í miðbýnum skipa fyri stórari mótasýning í Hotel Føroyum

MÓTASÝNING
Tíðindaskrív

Hóskvøldið 31. oktober kl. 19.30 skipa handlar í miðbýnum fyri mótasýning og hugnakvøldi á Hotel Føroyum.

Heystið er komið og hetta vikuskifti endar summartíðin, og kvøldini verða longri. Hetta er eisini veitslufúlt, lyst verður longu mú við jólaborðhaldum. Handlarnir í miðbýnum bjóða til hugnakvøld á Hotel Føroyum, har teir sýna fram alt tað nyggjasta innan móta til børn, ung og vaksin, til gerandis og til veitslu. Sonuleiðis luttaka blómu- og gávuhandlar, so okkurt gott hugskot fæst uttan iva til vetrin og jólini. Atgongumerkið er ein lutaseðil, og drigið verður millum nógvar góðar vinningar, m.a. tveir apex-feroyseðlar við Atlantic Airways.

Luttakandi handlar eru: Niels Arge, Barnsen/Norofashion, CN-Wear, Th. Dam Ítróttur, Diva, Fljóðið, Frú S, Hjá Kissa, Niggjuvogtjúgu, Kallkyn, Línbúðin, Mótaskálin, PAU, Seytjan, Sirni, Skálabúðin, TM Junior, Vilma, Vogue, Wangler og Fótbúni.

Harafturat hava hesi eisini stuðlað tiltakinum: Atlantic Airways, Føroya Banki, Føroya Sparikassi, Suðuroyar Sparikassi, Keypssamtøkin, Th. Dam á Háki, Marco Polo, Restaurant Merlot, Hotel Føroyar, Akðuleyg og Tróndur Hansen.

Atgongumerki kosta 50,00 kr. og fáast á Kunningarstovuni. Við í prísinum er kaffi og okkurt gott aftanvið.



TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

Tekniski Skúlin í Tórshavn søkir

lærara til maskindeildina

Starvið er eitt fulltíðarstarv.
Umsøkjarin skal hava sveinabrævið sum maskinsmiðjur og minst 2 ára starvsroynd innan yrki.
Umsøkjarar við hægri útbúgving hava fyrimun.
Eisini er áhugi fyri stødd-, alis- og evnafrøði, CAD/CAM, CNC og nýtslu av EDV, ein fyrimunur.

Setanarkor til fast starv:
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum verður settur í fast starv, má veroa til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg pedagogiska/undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðugt fyri at verða settur í fast starv.

Løn:
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstyri og FTL.

Starvið skal setast skjótast tilber og í seinasta lagi 1. desember 2002.

Skrivligu umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal verða skúlanum í hendi í seinasta lagi 7. nov. 2002.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til skúlan, tlf. 311957.

Tekniski Skúlin í Tórshavn
Marknagilsvegur 75 · 100 Tórshavn
Tel. 311957 · Fax 316621
e-postur: tst@tst.fo · www.tst.fo

-tað loysir seg

BRAKANDI BÍLIGT!

ZANUSSI HVÍTVØRUR • AVMARKAD NØGD

Almenn svimjing 2002/2003

Opið er soleiðis: frá 21.10.2002

Klokkan	Mánadag	Mikudag	Fríggjadag	Leygardag	Sunnudag
08.30-09.10					Børn og vaksin
09.15-09.55					Børn og vaksin
09.00-10.00				Eldrið og pensionistar	
14.00-15.00				* Bíleksð	
15.00-16.00				Foreldur og børn	
16.00-17.00				Foreldur og børn	
17.00-18.00		Børn og vaksin	Børn og vaksin	Børn og vaksin	
18.00-19.00		Børn og vaksin	Bert vaksin	Børn og vaksin	
19.00-20.00	Kvøldskúli	Bert vaksin			
20.00-21.00	Kvøldskúli	30 ár og eldri			

* Breka›: Skulu tekna seg á telefon 441477. Um ikki nógnógv tekna seg, fellur tímin burtur.

Kostna›ur: Børn 5 kr. Vaksin 10 kr. Avsláttarkort kunnu keypast
Børn, sum ikki klára seg sjálvi, skulu vera saman við vaksnum.
Leygardag er vatnviðheitari

Svimjihallin tlf. 441477
Ólavur Rasmussen